## Dansispøl í Esbjerg

Leygardagin 20. januar sleppa føroyingar í Esbjerg at royna ymisk gomul føroysk dansispøl. Tá fer nólsoyingurin Hilmar Joensen at halda fyrilestur um gamla siðin at halda trettanakvøld og tjúgundakvøld, og síðani fer hann at skipa fyri ymsum dansispølum. Um kvøldið verður dansur og dansispøl, og harmonikan sleppur eisini upp í part. Føroyiongafelagið í Esbjerg skipar fyri tiltakinum, sum verður í festsalinum í Skrænten 11.

## Vín ímóti krabbameini

Tað eru eini tíggju ár, síðani kanningar bendu á, at víndrúur og sostatt eisini vín kundu tálma krabbameini, og nú vil ein danskur granskari vera við, at tað er prógvað, at tað er so. Ole Vang, lektari á RUC, sigur, at evnið resveratrol, sum er í víni, forðar krabbameinskyknunum at veksa. Kanningarnar benda á, at vínslagið Pinot Noir virkar best, sigur hann. Í Kræftens Bekæmpelse ivast tey og vísa á, at alkoholið í víninum kann virka øvugt.

# Norröna skal í dokk

**Trupulleikar eru við stabilisatorunum, og tí er avgerð nú tikin um, at Norrøna verður tikin úr sigling í eina viku**

SKIPAFERÐSLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Trupulleikarnir við stabilisatorunum hava verið í nakrar vikur, og nú hevur Smyril Line tikið avgerð um, at skipið skal í dokk. Hetta verður gjørt í komandi viku, og tí verður skipið tikið úr sigling í døgunum 21. til 26. januar.

- Avgerðin um at fara í dokk kemur óivað illa við hjá fleiri kundum. Hetta eru vit sera hørm um, men neyðugt er at fáa umvælingina frá hondini sum skjótast. Vit hava millum annað í huga, at væl umtóktu páskatúrarnir skulu ikki nervast, sigur Thomas Magnussen, stjóri á Smyril Line.

At Norrøna seinastu dagarnar hevur siglt uttan stabilisatorar, hevur í ávísan mun darvað siglingini. Og tá veðrið so eisini spældi eitt puss seinasta vikuskiftið, gjørdist seinkingin heilt munandi. Í tíðindaskrivi verður tó sagt, at tá umvælingin er gjørt, skuldu trupulleikarnir verið loystir, soleiðis at siglingin aftur gerst meira reglulig.

Ferðafólk, sum eru farin avstað og skuldu koma heim aftur við Norrønu, nú hon verður tikin úr sigling, fáa bjóðaðar aðrar ferðamøguleikar frá Smyril Line, so tey sleppa heim. Onnur fáa tilboð um at fáa ferðaseðilin endurgoldnan, men tey kunnu eisini velja eina aðra ferð við Norrønu ístaðin, verður sagt í tíðindaskrivinum.



*Trupulleikar við stabilisatorunum hava seinkað nógv um siglingina seinastu vikurnar, men nú skal hetta fáast í rættlag, verður sagt av Smyril Line*

## Stórur áhugi fyri Fríkúlanum í Havn

**Mikukvøldið var stovnandi aðalfundur hjá Fríkúlanum í Havn, har skúlans viðtøkur vóru samtyktar.**

SKÚLAMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sambært Sharon Weiss og Eyðbjørg Dalsgaard, sum hava tikið stig til fríkúlan í Havn siga, at longu nú er bíðilisti til 1. flokk komandi skúlaár (2007/2008). Harumframt eru nøkur fá pláss tó eftir til børn, ið fara í 2. flokk komandi skúlaár.

Eitt av eyðkennunum hjá Fríkúlanum í Havn er, at skúlabólkarnir eru settir saman av børnum í tveimum árgangum. Hvør bólkur fevnir um eini 20 børn.

- Foreldur, ið ætla at søkja um pláss fyri børnum sínum, sum kunnu byrja í 2. flokki í Fríkúlanum í Havn, verða biðin um at seta seg í samband við skúlan sum skjótast, verður sagt. Eisini ber til at skriva børn á umsóknarlistan til komandi árini. Skúlin hevur eina heimasíðu www.friskulin.org har grundhugsjón skúlans og aðrar upplýsingar um skúlan eru at finna.

# Eitt ár til valið

**Landsstýrið situr í hesum døgum og bindur eina bukett av eyka uppskotum, nú farið verður undir síðsta árið av hesum samgonguskeiðinum**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, boðar frá, at hann hevur sett dagin til valið at vera um nágreiniliga eitt ár.

- Je havi sett ein reyðan ring um valdagin, sum sambært stýrisskipanini eigur at vera í seinasta lagi 20. januar. Men av tí, at hesin dagurin er ein sunnudagur, so mugu vit flyta valið til leygardagin 19. januar, sigur løgmaður.

Spurdur, hvat løgmaður fer at brúka hetta síðsta árið til, sigur Jóannes Eidesgaard, at samgongan, og harvið eisini landsstýrismenninir, eru í tí hepnu og óvanligu støðu, at hava ein góðan meiriluta, umframt at fíggjarliga støðan í landinum er betri enn væntað, tá samgonguskjalið var undirskrivað.




- Tí hava okur í landsstýrinum gjørt av, at hvør landsstýrismaður kann koma við einum ella tveimum eyka uppskotum, sum vit fara at bera niðan í tingið, sigur løgmaður. Hann vísir á, at uppskotini fara at koma borgarunum til góðar, soleiðis at talan verður um beinleiðis tilboð ella betran av tænastuni.

- Hetta verður ikki gjørt, tí at valið nærkast. Men nú hava vit møguleika at nýta hugflogið og harvið at koma við góðum politiskum hugskotum. Og tíðin er um at renna út, sigur Jóannes Eidesgaard.

Kortini vil løgmaður ikki avdúka nakað um, hvat vit kunnu vænta okkum.